

### Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur:

# – Fáa neyvan meiri kava á hesum sinni

Næstu dagarnar verður veðrið betri, sigur Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur:

– Tað veður minni vindur og lýggjari – eini 5-9 stig næstu dagarnar. Kanska kemur okkurt æl, men sólglottar standa somuleiðis á skránni, sigur Petur og skoytir uppí, at vit neyvan fáa meira kava á hesum sinni:

– Tað er ikki óvanligt, at vit fáa tveir »kavasnertar« í mai. Vanliga verður sagt, at teir koma á krossmessu og halvarðsøku. Nú hava hesir báðir snertarnir so verið, og eg vænti ikki meira at hesum slag fyribils, sigur Petur Skeel Jacobsen.

**- horsdal**




















